gult2 cyan2 magenta2 svart2



## Minningarorð um Jacob Monrad Joensen



Meðan sólin skein á gular sóljur í tí grøna grasinum, og mýrusnípan spenti sínar veingir, fingu vit tey sorgarboð, at tú mín kæri svágur, Jacob Monrad, var slóknaður, bert eina viku eftir, at vit vitjaðu teg á Klaksvíkar sjúkrahúsi. At tað skuldi ganga so skjótt, hevði eg ikki roknað við, at hetta varð tað síðsta farvæl og takka tær fyri alt tað, tú hevur verið fyri meg og míni.

Tað verður ein stórur saknur ikki at síggja títt smílandi andlit, títt góða lag og tín kærleika, ið tú vísti í verki tínari familju og nærmastu.

Mest komi eg persónliga at sakna tey livandi orðaskifti, vit ofta høvdu. Vit tosaðu opið um alt millum himmal og jørð. Tú var so væl inni í øllum samfelagsspurningum og sá, at fyri at fáa eitt betri samfelag, har tað sosiala bleiv prioriterað, mátti kvinnan verða við í avgerðunum.

Sum bygdaráðsformaður royndi tú á tín hátt at lyfta tað gamla bygdasamfelagið inn í nútíðina, hóast stóra mótstøðu frá konservativum kreftum, ja, so evnaði tú at betra um korini viðv. skúlaviðurskiftum, ungdómshús, at hjá komandi ættarliðum skuldi gerast lættari at arbeiða í bø og haga, arbeiddi fyri, at virkir komu og harvið arbeiðspláss, arbeiddi fyri gomlum og sjúkum, heimarøkt og mangt, mangt annað, og ikki minst kirkjuna, ið tú var so góður við.

Tú hevði sanniliga framtíðarvisiónir, sum hevði ov trong kor heima á landi. Á sjónum tók tú tær av nógvum unglingum, sum vóru komnir á skeiva kós, og við tínum næstrakærleika, humøri og arbeiðssemi fekst tú nógvar á rætta kós, ja, heilt frá Danmark vórðu unglingar sendir, og hetta nívdi teg, at tú ikki hesi seinastu árini kundi gera hetta arbeiðið.

Tá ið ommusonur mín bleiv sjúkur og ikki treivst undir New Foundlandi, ja, so var tú har við tíni hjálpandi hond, sum altíð, og hjálpti honum at koma heim í øllum góðum.

Teir sosialu samfelagsspurningarnir stóðu altíð ovarlaga á arbeiðssetningi tínum. T.d. trupulleikar av rúsdrekkamisnýtslu og avvarðandi teirra, ja, so hjálpti tú umframt persónliga so eisini pengaliga, t.d. Kreppumiðstøðini fyri kvinnur. Í kreppuárunum rann tú frá sakførara til sakførara fyri familjur, ið vóru við at missa hús og heim, tí gribbarnir lógu alla tíðina framvið at taka alt frá hesum familjum. Men tá var tú har og veitti eina hjálpandi hond, so familjurnar vórðu verandi. Jú, sanniliga ein hollur fosturlandsvinur, sum alla sína tíð arbeiddi í markini fyri teimum, ið trongdu til hjálp, tú var altíð til reiðar nátt sum á degi. Ein sannur stríðsmaður.

Altíð var tú fúsur at hjálpa øðrum, ongantíð hugsaði tú um teg sjálvan, tú gav teg altíð 100% fyri onnur, og tú gjørdi tað í verki. Eitt lýsandi dømi um næstrakærleika, ikki bara í orðum, men í verki. Tað er tað, ið telur.

Tað er torført at finna orð fyri tann sakn, ið nívur okkum í hesari løtu. Men vit eru takksom fyri alt tað, tú hevur verið fyri okkum. Tú verður ongantíð gloymdur. Má Harrin styrkja tíni nærmastu í stóru sorg teirra!

Friður veri yvir minninum um stríðsmannin Jacob Monrad, og takk fyri alt, tú var fyri okkum.

**svigarinna**

# Virki kunnu skráseta seg í oljudátabása

**Nú kunnu føroysk virki skráseta seg, so oljuoperatørar lættari kunnu fáa fatur á teimum**

OLJUVINNA
*Eirikur Lindenskov*



*Í dátabásanum hjá FOIR ber til hjá føroyskum virkjum at skrásetas eg, so lættari verður hjá oljuoperatørum at finna føroysk virki*

Oljuvinnufelagið hevur saman við oljuoperatørum í føroyska økinum gjørt eina veitaraskrá, nevnd FOIR (Faroese Oil Industry Register). Har ber nú til at skráseta seg.

Foir er sett saman av tveimum dátabásum. Í tí eina kunnu øll føroysk virki, sum hava áhuga í oljuvinnuni, skráseta seg. Upplýsingarnar, sum virkið skal skráseta, eru tær somu fyri øll virkini. Upplýsingar, sum skulu skrásetast, eru m. a., almennar upplýsingar um virkið, roknskaparligar upplýsingar, upplýsingar um heilsu, trygd og um hvørvi, upplýsingar um góðskustýring og upplýsingar um, hvørjar vørur og tænastu, virkið ætlar at bjóða fram í oljuvinnuni.

– Við at skráseta seg í Foir, verður virkið meira sjónligt fyri oljufeløgini og undirveitararnar á føroyska økinum. Kolvetnislógin ásetir, at oljufeløgnini skulu geva føroyskum virkjum ein veruligan møguleika at taka lut í eini føroyska oljuvinnu, sigur Oljuvinnufelagið í tíðindaskrivi. – Foir verður tí eitt amboð hjá oljufeløgunum og undirveitarum teirra at finna egnaðar føroyskar fyritøkur, sigur felagið.

Mannagongdirnar frá oljumálastýrinum fara at krevja, at útlendsku feløgini brúka Foir.

Í hina dátubásina eru upplýsingar frá oljufeløgum og undirveitarum til føroysku virkini at síggja. Feløgini skulu í góðari tíð skráseta allar sáttmálar oaman fyri 100.000 krónur í føroyskum øki. Dátúbásan skal geva føroysku feløgunum møguleika at vísa sín áhuga at taka lut yvir fyri útlendsku feløgunum. Oljufeløgini og undirveitararnir sklu eisini skráseta í dátubásina, hvør fær sáttmálarnar.

Meira er at frætta um hetta á www.foir.fo

## Gongurtúrur eystur á Gerðadalar

**Leygardagin skipar Norðoya Kunningarstova fyri gongutúri**

GONGUTÚRUR
*Tíðindaskriv*

**Klaksvík:** Leygardagin skipar Norðoya Kunningarstova fyri gongutúri eystur á Gerðadalar eftir Dalagøtuni.

Farið verður av »Grundum« við minnisvarðan í Gerðabø kl 13 um Kvígingaskarð oman í Kvígingardal, har steðgað verður á, og har verður okkurt leskiligt at fáa.

Farið verður síðan aftur til gongu úr Kvígingardali í Hellisdal um Heldarskarð gjøgnum Torvadal heim á Núpin, har komið verður umleið kl 19, og gongutúrurin er at enda komin.

Um ikki viðrar leygardagin verður roynt aftur sunnudagin, sigur Norðoya Kunningarstova.

Frásøgumaður á túrinum verður Andrass Joensen, bóndi í Niðristovu, Gerðum.

Áhugað kunnu keypa atgongumerki á Kunningarstovuni í Klaksvík til leygardagin kl 12, tað kostar 50 krónur fyri vaksin og 20 krónur fyri børn.

†

Kunngjørt verður, at okkara elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Hans C. Jacobsen**
(vanliga nevndur Hans hjá Poul Nikkel)
Tvørábakka, Tvøroyri

andaðist sunnudagin 8. juli.
Jarðarferðin verður hósdagin 12. juli kl. 13.00 úr Salem á Tvøroyri.

*Fyri tey avvarðandi*
**Poul, Rikka og Lena**

www. team.fo
Mini Cruise
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
til Bergens
Á ferðini verður m.a. skipað fyri Bingo
úr 650,-
www.smyril-line.fo
e-mail: booking@smyril-line.fo

gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Oljuskatturin skal til Klaksvíkar

**Nú er greitt, at oljuskattadeildin hjá Toll- og Skattstovuni skal liggja í Klaksvík. Hetta hevur Karsten Hansen gjørt av, nú teir fyrstu skattapengarnir frá oljuvinnuni skulu avreiðast í Føroyum. Hetta er øll starvsfólkini tó ikki so fegin um**

KOLVETNI
*Stefan í Skorini*



Fyrsta liðið av arbeiðsmonnum á oljuboripallinum Sovereign Explorer er farið til verka. Í hesum mánaðinum skulu teir tískil eisini lata sínar fyrstu krónur til føroyska skattavaldið. 35% skulu menninir, sum arbeiða á boripalli, lata í skatti.

Hesin skattur skal um Toll- og Skattstovuna. Har er sett á stovn ein kolvetnisskattadeild, sum skal taka sær av skattakrónunum úr oljuvinnuni. Henda deildin skal liggja í Klaksvík, tá oljuvinnan tekur dik á seg. Hetta hevur Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, kunnað starvsfólkið á Toll- og Skattstovuni um mánadagin.

Flytanin av kolvetnisdeildini er í tráð við samgonguskjalið, sum sigur, at ein partur av almennu umsitingini skal flytast úr miðstaðarøkinum og út til bygdirnar ella útjaðaran.

### Søkja eftir fólki

Óli Heinesen er leiðari á Toll- og Skattstovuni. Hann sigur, at tað fyrsta tey fara at gera er at søkja eftir fólki, tí sum nú er megna tey ikki alla umsitingina sjálv.

– Tá oljuvinnan er farin í gongd, krevur hetta nógva arbeiðsmegi á kolvetnisskattadeildini. Eg trúgvi, at vit mugu hava hjálp úr útlondum fyri at megna arbeiðsbyrðuna. Tað er eisini umráðandi, at fólk kemur higar at útbúgva okkara fólk, so tey vera før fyri at loysa uppgávurnar, sigur Óli Heinesen um kolvetnisskattadeildina.

Hann metir ikki, at flytingin kann fara fram fyrr enn einaferð í heyst, tí tað er ov krevjandi. Tað er tískil ikki væntandi, at kolvetnisskattadeildin verður flutt beinanvegin.

Óli Heinesen sigur, at enn er alt hetta ógvuliga nýtt, og tí vita tey ikki, hvussu alt hetta skal skipast í sambandi við oljuskattin, og tey mugu gera sær nakrar royndir.

Annars hevur ein arbeiðsbólkur við trimum fólkum arbeitt við oljuskattinum seinasta hálva árið. Tey hava verið í Noregi og Bretlandi og kannað, hvussu hetta arbeiðið er skipað har. Hesin bólkur hevur gjørt eitt tilmæli um, hvussu henda deildin skal skipast, men ikki tikið avgerð um, hvat hon skal liggja.

### Ikki so heppið

Onkur av starvsfólkunum vil vera við, at tað kanska ikki er so heppið at flyta deildina úr miðstaðarøkinum. Best hevði verið at kanna hetta arbeiðsøkið áðrenn avgerð er tikin um, hvar henda deildin skal liggja.

Henda deildin verður stór, tá oljan væntandi fer at spríkja úr undirgrundini, og nógv fólk fer at arbeiða har. Royndirnar hjá somu deildum í Bretlandi og Noregi eru, at stevningar kunnu væntast, tí trupulleikar um tulkingar av lógini standast, og umsitingin krevur nógv fólk.

Ein slík deild krevur, at møguleikar fyri at útvega væl útbúna arbeiðsmegi eru góðir. Harafturat kunnu væntast fleiri byrjunartrupulleikar, tí fundarvirksemi við oljufeløgini verður stórt, og tey eru øll í Havn.

Vit royndu at fáa eina viðmerking frá Karsten Hansen, landsstýrismanni, men hann var ikki at hitta.



*Kolvetnisskattadeildin skal liggja í Klaksvík. Hetta hevur Karsten Hansen, landsstýrismaður, gjørt av. Ein oljukelda kann geva landskassanum einar 10 milliardir krónur, og tær skulu venda í Klaksvík*

Íbúgvar í Smærugøtu:

# Ikki øll standa saman

**Fólk í Smærugøtu í Havn vilja fegin gera vart við, at ikki øll húsarhaldini hava skrivað undir mótmælisskrivið, ið sent varð myndugleikunum, har tey mótmæla at ætlanunum um, at fleiri brekað flyta inn í grannalagið**

SAMBÝLI
*Stefan í Skorini*

Herfyri stóð grein í Sosialinum um, at íbúgvar í Smærugøtu í Havn ikki vilja hava fleiri brekað í grannalagið, tí frammanundan eru tvey sambýli í økinum.

Tey bóru ótta fyri, at menningartarnað við álvarsomum atferðartrupulleikum, sum kanska kundu vera vandamikil við kriminellari fortíð, fóru at flyta inn í gøtuna.Tey hildu tað vera skeivt fyrst at royna at flætta tey brekaðu inn í samfelagið saman við vanligum fólki og síðani at savna tey brekaðu samanaftur, tætt saman í lítlum øki.

Tí tóku tey stig til mótmælisskrivið. Eini 10-12 húsarhald í gøtuni hava skrivað undir, fingu vit at vita frá einum teirra.

### Ikki øll við

Fólk búsitandi í Smærugøtu hava nú gjørt vart við, at ikki øll standa saman um hetta skrivið.

Bára Johansen býr í Smærugøtu, og hon vísir á, at eini tredivu hús eru í gøtuni, og tí stendur grannalagið ikki saman um hetta.

Hon er ikki samd við hinum í, at enn eitt sambýli í gøtuni fer at oyðileggja umhvørvið. Hon bjóðar hinvegin teimum brekaðu vælkomnum í gøtuna, og hon vil fegin hava tey búgvandi har.

Hildur Jensdóttir Joensen er ein onnur, ið ikki vil hava nakrar ákærur sitandi á sær. Hon sigur seg heldur ikki kenna nakað til, at fólk steingja hurðarnar, tí tey ikki kenna seg trygg í grannalagnum.

Harafturat vil hon vera við, at tey ikki hava sæð hetta skrivið fyrr og hava tí ikki havt møguleika at mótmæla skrivinum.

HF Hotel Föroyar
Tlf. 317500
Hotellið við útsýninum
Vikuskiftistilboð
fríggja-, leygar- og sunnudag
Í tíðarskeiðinum 13.-15. juli og 20.-22. juli
Gist eina nátt á fyrstaflokks kamari við øllum hentleikum. Morgunmatur íroknaður. Matstovan borðreiðir við 3 rættum.
Kostnaður fyri hvønn á dupultkamari kr. 450,-.
Eyka fyri einakamar: kr. 100,-
Eyka nátt á dupultkamari kr. 275,- fyri hvønn
Eyka nátt á einakamari kr. 450,- (avmarkað pláss)
Serpris til børn ið gista inni á kamarinum við vaksnum
Altíð vælkomin á
Hotel Föroyar
Tlf. 317500
Best Western